# Tíðindabræv




Tórshavnar Kamarkór er júst afturkomið av fer í Slesvig. Kórið varð boðið at luttaka á ró- og mentanarstevnuni, sum var í Slesvig í døgunum 5.- 9. august. Kórið hevði fýra framførðslur.

Sungið var á strondini tá róðrarbátarnir, við Naddoddi og hornblásarum á odda, komu rógvandi inn at strondini. Ein sera bergtakandi stund.

Síðan sang kórið tá stevnan varð sett. Millum røðararnar vóru Hansara Hátign Joakim Prinsur og Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Leygardagin varð sungið úti á vøllinum á høvuðstónleikarasenuni. Nógv fólk var til hesa framførðslu, tó at ljóðviðurskiftini vóru ikki heilt nøktandi.

Hæddarpunktið var, tá Kamarkórið sang í sera hábærsligu Dómkirkjuni í Slesvig, sum hevur avbera góð ljóðviðurskifti - júst sum kórsangarar ynskja sær tá tað er best.

Fyri framman hevur kórið fleiri avbjóðingar, og fer nú undir eina verkætlan at syngja saman við The Romeo & Juliet Choir / the royal dramatic theatre, í Svøríki.



## Ellisakfør vitja á Sornfelli

ÚTFERÐ

*Tíðindaskriv*

Hóskvøldið skipa Føroya Ellisakfør fyri útferð við ellisakførum niðan í Mjørkadal og á Sornfelli.

Gomlu bilarnir og gomlu motorsúkklurnar koyra frá hølunum yvir við Strond kl 18:30 við kós móti Mjørkadali.

Eftir rundvísing og frágreiðing á støðini í Mjørkadali verður koyrt niðan á Sornfelli, har farið verður innar og upp í kupilin.

Felagið heitir á limirnar um at tekna seg til ferðina í felagshølinum.

W W W . S O S I A L U R I N . F O




Vika 34, 2004
www.kaupthing.fo

## Oljan setti aftur nýtt met

Oljan setti nýtt met um vikuskiftið, eftir at ófriður tók seg upp í Venesuela, í samband við møguligt forsetaval í landinum. Fíggjarmarknaðirnir eru bangnir um, at støðan í Venesuela kann føra við sær verkfall, ið kann steðga landsins oljuframleiðslu. Nú framleiðslan, í at kalla øllum oljuframleiðandi londum, er á hægsta stigi, vil ein og hvør framleiðslusteðgur ávirka prísleguna.

Eftir rentufundin hjá amerikanska tjóðbankanum (FED) í farnu viku, har teirra leiðandi renta var hækkað úr 1,25% í 1,50%, varð kunngjørt, at FED framvegis er bjartskygt um amerikanska búskapin. Sambært FED og FED stjóranum Greenspan, er búskapurin í USA sostatt heilt greitt ikki uppsteðgaður.

Hóast uppgerðin fyri smásøluna í USA í juli gjørdist lægri enn væntað, so var juni dagført so mikið nógv rættan vegin, at ábendingarnar eru greiðar: nýtsluhugurin er til staðar. Samstundis vísti onnur uppgerð, at tey sum søkja um arbeiðsloysisstuðul fækkast. Hetta ørkymlar eitt sundur myndina á arbeiðsmarknaðinum í USA, tí stovnsetanin av arbeiðsplássum hevur í seinastuni verið eitt vónbrot. Ein framgongd á hesum økinum tikist tó aftur at verða í ljósmála. Greenspan hevur sostatt eina orsøk til at vera bjartskygdur.

Á partabrævamarknaðunum vóru høvuðstíðindini í farnu viku, at Cisco og Hewlett-Packard kunngjørdu vánaligan roknskap, meðan Dell kunngjørdi góðan roknskap. Tíðindini frá øllum trimum virkjunum, serliga Cisco, ávirkaðu marknaðirnar, men Dell megnaði at toga amerikonsku marknaðirnar í pluss fríggjadagin. Hesa vikuna kunngerða m.a. Lundbeck, Danske Bank og Nordea.

Aftur hendan vikan fer at vera ávirkað av, hvussu oljuprísurin háttar sær. Tískil verður áhugavert mikudagin, tá mánaðarliga oljufrágreiðingin frá OPEC verður kunngjørd. Áhugaverdast verður sjálvandi at síggja, hvørja meting tey hava um prísstigið og hvørjar tey meta framleiðslumøguleikarnar hjá limalondunum at verða. Herumframt verða týðandi prísvakstrartøl úr USA kunngjørdi; tøl, ið fara at ávirka rentustigið á lánsbrøvunum. Í stuttum metur Kaupthing tískil, at ein óstøðug vika er fyri framman.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig | |
|---|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% | → |
| 2 ára lánsbræv | 2,50% | -0,02% | ↓ |
| 5 ára lánsbræv | 3,53% | -0,03% | ↓ |
| 10 ára lánsbræv | 4,19% | -0,03% | ↓ |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| KFX, Danmark | 265,6 | 0,8% | ↑ |
| OMX, Svøríki | 649,8 | -1,1% | ↓ |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.581,7 | -0,6% | ↓ |
| S&P 500, USA | 1.064,8 | 0,0% | → |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,90 | 0,2% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 167,32 | 0,1% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 75,44 | -0,2% | ↓ |
| Altjóða Vøkstur | 57,54 | -0,5% | ↓ |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 602,40 | -0,6% | ↓ |
| EUR | 743,76 | 0,0% | → |
| GBP | 1.109,91 | -0,5% | ↓ |
| NOK | 89,79 | 0,2% | ↑ |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Studentar frá 1959 hittust í Havn

**Leygardagin 24. juli 2004 hittust nøkur av teimum, sum tóku studentsprógv á VBV við Skansavegin í Havn í 1959. Hetta hava tey gjørt fimta hvørt ár. Í ár eru liðin 45 ár síðan próvtøkuna.**



*Á hesi myndini, sum varð tikin hjá Bambus Foto í 1959, eru studentarnir saman við lærarunum.*
***Aftara rað f.v.:*** *Kjartan Kristiansen, Tórshavn, Heini Davidsen, Tórshavn, Thomas Nygaard, lærari, Kristian Haraldsen, lærari, Arnbjørn Mortensen, lærari, Axel Tórgarð, lærari, Andreas Højgaard, lærari, Kristoffer Lützen, lærari, Erik Petersen, lærari, Arnbjørn R. Thomsen, Tórshavn, Oddmar Niclasen, Velbastaður, og Svenn Brimheim, Tórshavn.*

***Miðraðið f.v.:*** *Magnus Pauli Magnussen, Tórshavn, Jógvan Durhuus, Vestmanna, Bjarni Bæk, Tórshavn, Jens Kristian Knudsen, Klaksvík, Annfinn Rubek Nielsen, Tórshavn, og Hans Danielsen, Tórshavn.*

***Fremra rað f.v.:*** *Any Joensen, Tórshavn, Vilgerð Hansen, Klaksvík, Julianna Klett, Tórshavn, Maria V. Johannesen, Klaksvík, Maria Poulsen, Vestmanna, Marjun Olsen, Tórshavn, og Daphne Mittún, Tórshavn.*

*Av lærarunum eru bert Axel Tórgarð og Erik Petersen á lívi.*

*Myndaeigari: Svenn Brimheim*



*Hendan myndin er av teimum, sum hittust leygardagin 24. juli 2004 í Havn.*
***F.v.:*** *Kjartan Kristiansen, Tórshavn, Any Nielsen (f. Joensen), Klaksvík, Heini Davidsen, Glostrup, Jógvan Durhuus, Vestmanna, Julianna Klett, Tórshavn, Magnus Pauli Magnussen, Hoyvík, Maria Johansen (f. V. Johannesen), Tórshavn, Hans Danielsen, Tórshavn, Marjun Jørgensen (f. Olsen), Herlev, og Svenn Brimheim, Tórshavn.*

*Tey sum vanta á myndini eru: Jens Kristian Klaksvig (f. Knudsen), Keypmannahavn, Anfinn Rubek Nielsen, Tórshavn, Maria Rimestad (f. Poulsen), Vanløse, og Daphne Mittún Munk, Vordingborg.*
*Trý av teimum, sum tóku studentsprógv í 1959 eru deyð, tey eru: Vilgerð Astridardóttir (f. Hansen), Tórshavn, Arnbjørn R. Thomsen, Tórshavn, og Oddmar Niclasen, Velbastaður.*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at elskaði sonur okkara, beiggi og ommu- og abbasonur

**Eiwind Dalsgaard Henriksen**

sonur Jenny Dalsgaard og Jónbert Henriksen andaðist í Grindsted 13. august 20 ára gamal.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jenny, Jónbert og systkini**

## Dagurin

**Anastasisius.** Annaðhvørt tann Anastasius, sum var biskupur í Terni í Italiu í 6. øld ella ein Anaststius, ið doyði sum pínsluváttur í Persiu umleið ár 620.